# Ikki eitt kis frá »Skriket«

**Teir, sum sunnudagin rændu teir kendu málningarnar »Skriket« og »Madonna« úr Munch-savninum í Oslo, hava ikki latið frætta frá sær. Serfrøðingar halda, at onkur kann hava áhuga í at keypa málningarnar**

LISTARÁN
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



Munch-savnið í Oslo var stongt í gjár, eftir at ránsmenn sunnudagin rændu tveir teir kendastu málningarnar hjá savninum, »Skriket« og »Madonna«, sum listamaðurin Edvard Munch málaði.

Stutt aftan á ránið fann løgreglan bilin, sum ránsmenninir flýddu í, og hon fann eisini rammarnar, sum ránsmenninir høvdu tikið av myndunum. Løgreglan í Oslo segði í gjár, at kanska kunnu DNA-royndir av bilinum og rammunum hjálpa løgregluni at finna ránsmenninar.

Fólk, sum vóru á Munch-savninum, tá teir vápnaðu ránsmenninir fóru við málningunum, hava greitt løgregluni frá, at teir tóktust vera sera væl fyrireikaðir, men løgreglan heldur tvørturímóti, at talan var neyvan um professionellar listatjóvar. Tað sama heldur eitt av vitnunum:

– Annar av monnunum stríddist við at fáa málningin av »Madonnu« niður. Tá veirarnir, sum málningurin hekk í, vístu seg at halda, kom fjáltur á mannin. Tað tóktist eisini, sum at hann visti ikki, hvat »Skriket« hekk, sigur Christina Vassilion við blaðið VG.

### Tríggir møguleikar

Sambært norsku bløðunum arbeiðir løgreglan við trimum møguleikum.

Í fyrsta lagi er tað møguligt, at ránsmenninir høvdu fingið til uppgávu at ræna málningarnar fyri onkran annan. Í øðrum lagi rændu teir málningarnar við tí fyri eyga at krevja loysigjald, og tann triði møguleikin er, at ránsmenninir einans rændu málningarnar fyri at gera vart við seg.

Ein onnur útgáva av málninginum »Skriket« varð rændur í 1994, og ránsmaðurin, Pål Enger, fekk seks ára fongsul fyri ránið. Í gjár hevði løgreglan ikki kannað, um hann hevur nakað við ránið sunnudagin at gera, men sjálvur segði hann við blaðið VG, at hann hevði ongan kunnleika til tað. Harafturímóti segði hann seg hava varhugan av, at ránsmenninir ætlaðu at fáa løgregluna at halda, at hann hevði verið uppií hesaferð eisini.

### Kunnu seljast

Hildið verður, at »Skriket« og »Madonna« eru meiri enn 500 milliónir krónur verdir, men spurningurin er, um tað fer at bera til hjá ránsmonnunum til at selja tvey so kend listaverk uttan at avdúka seg.

Leif A. Lier, sum stóð fyri kanningunum, tá »Skriket« bleiv rænt í 1994, segði við norska útvarpið í gjár, at eftir hansara tykki eru tað fólk, sum eru til reiðar at keypa tveir so kendar málningar, sjálvt um teir eru rændir.

Bretski løgreglumaðurin Charles Hill, sum hjálpti norsku løgregluni at finna »Skriket« aftur fyri tíggju árum síðani, heldur ikki, at ránsmenninir ætla sær at selja málningarnar.

– Fyrr ella seinni fara teir at krevja loysigjald fyri at lata Munch-savninum málningarnar aftur, men tað er umráðandi, at teir ikki fáa nakað loysigjald, sigur Charles Hill.

### Vánalig trygd

Flestu norðmenn eru skelkaðir av, at tað kundi vera so lætt hjá tveimum monnum at fara inn á Munch-savnið eftir tveimum so kendum listarverkum, og nú krevja fleiri, at trygdin á søvnunum verður bøtt munandi.

Valgerd Svarstad Haugland, mentamálaráðharri, segði við NTB í gjár, at tey norsku søvnini mugu kanna sínar trygdarreglur av nýggjum, tí málningar sum teir hjá Edvardi Munch eru dýr tjóðarvirði, segði hon.

Norskir savnsvørðar siga tað sama. Teir bera nú ótta fyri, at útlendsk søvn fara at aftra seg við at læna norskum søvnum listarverk at sýna fram, tí trygdin í Noregi er ikki nóg góð.









ítróttur

Nr. 159 • týsdagur • 24. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Toppskjúttin fer til Íslands

**Íslendska KR og Rógvi Jacobsen skrivaðu mánadagin undir sáttmála, sum bindur føroyska landsliðsleikaran at íslendsku meistarunum tey bæði næstu árini**

LEIKARASKIFTI
*Jákup Mørk*

Tað eru longu nakrir mánaðir síðani, at tað kom fram, at íslendska KR hevði áhuga í Rógva Jacobsen, og hóast hetta ikki gjørdist av nøkrum í fyrsta umfari, so er íslendski áhugin ikki kólnaður.

– Rógvi Jacobsen er okkara fremsta mál á listanum, og verður tað ikki nú í summar, so spælir hann við okkum næsta ár, skrivaði formaðurin hjá KR á heimasíðu felagsins í juli mánaði, og nú vísir tað seg, at hann hevði rætt.

Rógvi Jacobsen og KR komu nevnliga um vikuskiftið ásamt um sáttmála, sum komandi tvey árini bindur føroyska landsliðsleikaran at íslendsku meistarunum næstu tvey árini.



*Føroyski landsliðsmiðvøllurin verður at kalla íslendskur, nú Rógvi Jacobsen fer sama veg, sum Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson longu eru farnir*

### Keyptur sum miðvallari

Sáttmálin tekur við hálvan november, og Rógvi dylir ikki fyri, at tað hjá sær er gleðiligt, at hann soleiðis eisini kann vera partur av HB-liðnum.

– Teir vóru í samband við meg longu í vár, men tá svaraði eg, at eg fyrst og fremst vildi gera útbúgvingina hjá mær lidna.

Útbúgvingin var liðug í summar, men hóast hetta, so dylir Rógvi ikki fyri, at hann eisini er fegin um, at hann slapp at spæla kappingarárið í HB liðugt.

– Sjálvandi vildi eg ógvuliga fegin sleppa avstað, men sum kappingarárið í Føroyum gekk, so vildi eg eisini fegin sleppa at spæla árið liðugt her. Tíbetur eydnaðist tað at fáa eina avtalu, har eg komið til felagið í november mánaði, so eg fái sluttað ordiliga av her, og tað vildi eisini verið keðiligt, um eg kom til nýtt felag mitt í einum kappingarári, heldur Rógvi.

Og so kann at enda viðmerkjast, at tað er sum miðvallari, at Rógvi er keyptur til Íslands.

– Tað siga teir í øllum førum, at tað er. Men kanska broyta teir fatan, um teir hyggja at máltindinum sigur føroyski toppskjúttin smílandi at enda.

### Sáttmálaleysur

Í HB siga tey sum vera man, at tað sjálvandi er stórur missur, at Rógvi nú fer úr felagnum. Enntá upp á sokallaðan frían transfer, tí sáttmáli hansara við HB gongur við kappingarlok í ár.

– Sjálvandi høvdu vit fegnir vilja longt sáttmálan við Rógva, men tað er nú einaferð soleiðis, at tingini hanga saman, so tað fáa vit ikki gjørt so nógv við, sigur stjórin í Havnar Fótbólti, Steinfinnur Mittelstein.

Hann leggur tó afturat, at teir í leiðsluni í felagnum ikki vilja forða nøkrum av leikarum felagsins í royndunum at sleppa avstað, og at HB heldur ikki hevur forðað Rógva í hesum.

– Nú veit eg væl, at tað hevur verið nakað skrivað um málið, men vit hava alla tíðina stuðlað Rógva í hesum. Hetta er kanska eisini ein møguleiki, sum er sprottin úr dystunum, sum vit hava leikt móti KR tey bæði seinastu árini, umframt at teir sjálvandi eisini hava sæð Rógva leikt á landsliðnum.

– Nú er sáttmálin so komin endaliga í lag, og eg kann bara staðfesta, at vit eru fegnir um, at Rógvi hevur fingið hendan møguleikan, eins og vit fegnast um, at áhugin fyri HB og okkara leikarum tykist vera uppgangandi. Tað merkir so hinvegin ikki, at vit bara vilja avreiða leikarar ókeypir, tá fyrispurningar eru, men tað vísir, at tað er eitt gott arbeiði, sum verður gjørt í felagnum, sigur Steinfinnur Mittelstein at enda.

Tað er North Atlantic Football Agency við Jákupi í Stórustovu, sum hevur staðið fyri samráðingunum við íslendska felagið.

## Ítróttargudstænasta í Klaksvík

**Í samband við 100 ára føðingardagin hjá KÍ, bjóðar Christianskirkjan saman við KÍ, til Ítróttargudstænastu**

Gudstænastan verður í kvøld klokkan 20.00, og á skránni er felagssangur, stutt andakt við Pól Johannessen trúboðara, og so kemur kendi gospelbólkurin I AM, at luttaka við sangi.

Umframt hetta, so kemur 1. deildar- og landsliðsleikarin Atli Danielsen, at siga nøkur orð.

Christianskirkjan og Klaksvíkar Ítróttarfelag, bjóða øllum hjartaliga vælkomin til hesa Ítróttargudstænastu.

## Ragnar Stakksund til grannarnar

Enn eru allir lutir ikki endaliga avgreiddir, men gongst sum ætlað, so verður Ragnar Stakksund at síggja á meistaraliðnum hjá Kyndli til komandi kappingarár.

Kviki vongspælarin hevur ananrs fingið sína hondbóltsuppaling hjá Neistanum, har hann eisini hevur fingið sítt gjøgnumbrot á besta liðnum, men eins og fleiri av liðfeløgunum hava gjørt tað í ár, so tykist Ragnar nú eisini at leita eftir nýggjum avbjóðingum.

Samstundis liggur tað í kortunum, at Kyndil fer at styrkja seg við einum útlendskum leikara. Hetta tóktist annars gleppa, tá Damir Oros ístaðin valdi at fara til Neistan, men hóast formaðurin í felagnum, Jóannes Dalsgarð, ikki vil gera konkretar viðmerkingar til hetta, so vita álítandi keldur at siga, at talan verður um útlendskan styrk.

Og eftir at meistaraheitið í fjør kom til høldar, tykist formaðurin ikki vera í iva um, hvat málið skal verða komandi kappingarár.

– Vit hava eitt fínt lið við teimum leikarum, sum vit høvdu í fjør, og tað, sum so kemur afturat, fer vónandi bara at styrkja enn meira um hópin. Sjálvandi skal skinnið ikki seljast, fyrr enn bjørnin er skotin, men vit fara so altíð at royna at vinna okkum heilt fram í oddin, sigur Jóannes Dalsgarð.

-jm